

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 04 - 2013

# Oljuprísurin lækkar

Oljuprísurin er munandi lækkaður seinastu dagarnar og er í løtuni góðar 101 dollarar fyri tunnuna. Fyri fáum døgum síðani var hann 105 dollarar. Orsøkin til stóru lækkingina er sambært Reuters óttin fyri vøkstrinum í altjóða eftirspurninginum. IEA, EIA og OPEC hava øll endurskoðað sínar metingar fyri hetta árið, um somu tíð sum altjóða oljugoymslurnar fyllast. Marknaðurin er ávegis móti framhaldandi afturgongd orsakað av vánaliga útlitinum í eftirspurninginum og eisini ein sum heild veikan heimsbúskap, sigur Ken Hasegawa í Newedge til Reuters. Men kortini eru tað framhaldandi vónir um, at altjóða búskapurin fer at betrast, sigur hann.